Álit

í

løgtingsmáli nr. 4/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, hevur lagt málið fram tann 23. august 2023 og eftir 1. viðgerð tann 7. september 2023, er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. september 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu.

Uppskotið hevur við sær, at árliga framhaldandi veitingin frameftir verður javnað við lønarvøkstrinum í samfelagnum. Tað merkir, at realvirðið av veitingini ikki missir virði, men fylgir lønarvøkstrinum í samfelagnum. Nevndin heldur hetta vera eitt gott uppskot, sum hevur við sær batar fyri arbeiðsfólk. Hoyringarskrivini til uppskotið eru somuleiðis positiv.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 19. september 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur